# Stórfingin gáva við ongum móttakara

RÓSA SAMUELSEN
løgtingslimur



28. apríl 2007 vóru umboð frá hálendsku løgregluna í Føroyum og handaðu løgmanni, sum verja fyri Bjargingarfeløgunum í Føroyum, eina stórfingna gávu. Talan var um eina rúgvu av radiosamskiftisútgerð, sum skuldi vera eitt stórt íkast til ta føroysku tilbúgvingina. Løgmaður handaði beinanvegin útgerðina yvir vil LFB. Talan var um 140 handbornar sendarar, 10 anlegg til bilar ella bátar og 6 umsetarar at seta upp úti um landið so at tryggjast kundu betri sendaraumstøður.

Arbeiðið hevur gingið toluliga. Færøernes Kommando, Kall og Landsverk hava givið tilmæli um, at útgerðin kann koma ókeypis inn í teirra hølir. Søkt hevur eisini verið til Føroya Tele, men har er einki at heinta.

LFB hevur arbeitt við at fáa sett radioútgerðina upp, men av tí at hetta er nakað kostnaðarmikið bleiv søkt um stuðul til verkætlanina frá Fiskimálaráðnum. Talan er um eingangskostnað uppá kr. 43.100 fyri góðkenning av útgerðini og fyri árligan rakstur uppá kr. 182.125.

Fjarðskiftiseftirlitið skal geva frekvensloyvi og góðkenna øll tólini umframt at gjaldast skal fyri stovning av hvørjum einstøkum tóli. Søkt hevur eisini verið um at sleppa undan at gjalda fyri góðkenning, frekvensleigu og stovning, men Fjarðskiftiseftirlitið vil ikki ganga umsóknini á møti.

Ein kann undrast yvir hettar tí henda útgerð er eitt sera gott íkast til alla ta Føroysku tilbúgvingina, sum er komin til landið ókeypis.

Beint undan løgtingsvalinum var fundur við táverandi landsstýrismann í tilbúgvingarmálum, men orsaka av valinum steðgaði hetta upp, og einki hevur verið at frætt síðani.

**Missa møguliga útgerðina í summar**

Hálendingar hava ferð eftir ferð spurt hvussu gongur at fáa útgerðina upp, men enn hevur bara verið roynt sum frægast at tosa seg burtur úr hesum.

Hálendingarnir koma til Føroya í summar, og er einki hent við útgerðini tá, so taka teir hana aftur við sær, fleiri líknandi prosjekt eru koyrandi í Namibia og Brasilia, nevnast kann, at tosað hevur verið um at LFB hevur møguleika at fáa meira útgerð um áhugi er fyri tí.

Tað vildi verið stórt spell og ein stórur missur fyri tað Føroysku tilbúgvingina og ikki minst skomm, um løgmaður bleiv noyddur at handað útgerðina av landinum aftur í summar.

**Spurningar til Tórbjørn Jacobsen**

Undirritaða setti í farna mánaði Tórbirni Jacobsen ein munnligan fyrispurning í løgtinginum um hesi viðurskifti, men av tí at landsstýrismaðurin var burturstaddur, tá fyrispurninguirn skuldi svarast, og tíðarfreistin fyri at seta munnligar fyrispurningar í hesi tingsetuni er farin, loyvi eg mær at spyrja landsstýrismannin spurningarnar ígjøgnum fjølmiðlarnar. (Spurningarnir eru orðaðir, áðrenn fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 var lagt fram.)

1. Er peningur settur av til radioverkætlanina til ta Føroysku tilbúgvingina á fíggjarlógini?
2. Um ikki, kann landsstýrismaðurin so greiða frá, hví landsstýrið hevur valt, ikki at seta pening av til endamálið?
3. Um peningur er avsettur til endamálið, merkir tað so, at bjargingarfeløgini missa eina tilsvarandi upphædd av tí stuðli, sum annars hevur verður veittur teimum?

# Viðmerking til Ivan Niclasen

JÓNSVEIN BECH



Síggi í bløðunum, at Ivan Niclasen svarar viðmerkingunum, sum hava verið í bløðunum um dagarnar um tann fullkomuliga vantandi áhuga hjá Kringvarpinum, útvarpinum og sjónvarpinum, at gera nakað burtur úr 100 árahaldinum hjá Tvøroyrar kirkju. Ikki so frægt, at tað var vert at nevna í nakrari av tíðindasendingunum. Undantikið er Suðurgerði, men tað er eisini ein sending, sum er gjørd her suðuri.

Ivan umber seg ella teir við, at teir hava ikki vitað um hetta tiltak. Tað undrar meg.

Longu fyri meira enn einum ári síðan, um ikki tveimum, gav urguleikarin við kirkjuna, Jens Mortan Mortensen, út eitt hefti í samband við 100 ára haldið "Tvøroyrar kirkja 1908 - 2008." Umframt við orðum og myndum at greiða frá søgu kirkjunnar, eru nótar til tónleik, sum hann hevur skrivað, og ein fløga, hann sjálvur hevur spælt inn við urguni í kirkjuni.

Og 8. februar í ár stóð ein tíðindastubbi á Suðuroyarportalinum um 100 ára dagin hjá Tvøroyrar kirkju. Har var eisini skráin, sum var við at verða fyrireikað til hátíðarhaldið lýst. Tær ferðir ein í fjølmiðlunum hoyrir teir hava tíðindi úr Suðuroynni, so er tað sum oftast sum tíðindi frá Suðuroyarportalinum. So tað er løgið, at júst hetta skal vera farið aftur við borðinum, uttan at nakar í Kringvarpinum hevur lagt merki til tað.

Eisini hava fleiri tíðindastubbar staðið á nevnda portali í somu viku sum hátíðarhaldið var.

Útvarpið var eisini vitandi um gudstænastuna Kristi Himmalferðardag. Fyrst í apríl mánaði varð eg uppringdur um eina útvarpsgudstænastu sunnudagin 13. apríl. Tað lá ikki fyri, tí at eg hevði frí ta vikuna. Men samstundis gjørdi eg vart við gudstænastuna í Tvøroyrar kirkju 1. mai í samband við 100 ára dagin. Og skuldi viðkomandi, sum ringdi, merkja sær tað. Men heldur ikki haðani hoyrdist nakað.

Men sama ger. Vit, sum hava fyrireikað hátíðarhaldið, hava fingið so nógvar positivar afturmeldingar frá teimum, sum vóru við til tað, at vit mugu siga okkum at vera sera væl nøgd, samstundis sum vit harmast um, at tey mongu, sum ikki kundu vera við, og tí høvdu vónað at kunna vera tað gjøgnum annan av okkara almennu luftbornu fjølmiðlum, ikki fingu tann møguleikan.

Og framyvir skulu vit nokk lata vera við at órógva tykkum fleiri sunnu- og halgidagar.

# Viðmerkingar til grein í Sosialinum um alduorkuverkætlan hjá Sewave

PETUR JOENSEN
Settur stjóri
Jarðfeingi



Grein í Sosialinum um alduorkuverkætlan hjá Sewave og almennan stuðul gevur okkum orsøk til at gera hesar viðmerkingar.

Sum vit lesa greinina, undrast greinskrivarin á, at alduverkætlanin hjá Sewave møguliga ikki verður framd í Føroyum. Grundarlagið undir hesi undran tykist vera, at verkætlanin kundi verið við til at *"..vit seta við og koma okkum inn í altjóða samfelagið, har tað ber nøkrum okkara til at vera við í fremstu røð á sinum øki. Eisini fyri at vísa umheiminum í verki, at Føroyar ynskja at átaka sær sín leiklut – eisini í altjóða gransking og menning."* Áskoðanin tykist sostatt vera, at grundarlagið fyri, at almennu Føroyar skulu luttaka (fíggjarliga) í verkætlanini, er fyri at koma inn í altjóða samfelagið og verða við í fremstu røð, umframt at vísa umheiminum, at Føroyar átaka sær sín leiklut.

Ætlanin við hesi viðmerking er ikki at meta um áskoðanina hjá greinskrivaranum. Hinvegin halda vit tað vera rætt at gera vart við, at tá eitt tilmæli frá Jarðfeingi verður umrøtt í greinini, er tað týdningarmikið, at umrødda tilmælið hjá Jarðfeingi verður sett í rætt høpi. Tí greinin kann geva lesaranum skeiva fatan av tilmælinum. Orsøkin til hetta man helst vera, at greinskrivarin ikki hevur tikið støðið í sjálvum tilmælinum, men í blaðgrein, har bert partur av tilmælinum kemur fram.

Greinskrivarin metir um verkætlanina í tí høpi, sum nevnt er omanfyri, meðan Jarðfeingi, sum fakmyndugleiki hava mett um verkætlanina í føroyskum orkuhøpi.

Jarðfeingi gjørdi á sumri í 2007 eftir áheitan frá Vinnumálaráðnum viðmerkingar til umsókn frá Sewave um stuðul til alduorkuverkætlanina. Sum stovnur, ið m.a. umsitur orkumál, gjørdu vit okkara viðmerkingar við støði í orkupolitiska uppritinum, ið var til aðalorðaskiftis í løgtinginum í februar 2007. Í høvuðsheitum vóru viðmerkingar okkara, at um tað almenna skal stuðla verkætlanini fíggjarliga við støði í orkupolitikkinum, eigur tað at verða við grundgeving í, at verkætlanin kann verða ein skilagóð íløga at fáa til vega orku, og/ella at hon er ein skilagóð granskingarverkætlan til frama fyri føroyska orkuveiting.

Sum íløga í at fáa til vega orku, mettu vit ikki grundarlag verða fyri verkætlanini. Fyribils íløguna við einari turbinu metti Sewave at vera uml. 40-45 mió. kr. Fyri tað kundi væntast ein el framleiðsla á 1 MWt árliga. Til samanberingar kann t.d. nevnast, at íløgur á uml. 20 mió. kr. í vindmyllur geva 7-8 MWt. Verða 8 turbinur settar upp, verður kostnaðurin fyri alduorkuverkætlanina mettur til uml. 100 mió. kr., og kann framleiðslan tá verða uml. 8 MWt.

Hin møguleikin er, at verkætlanin verður stuðlað sum ein granskingarverkætlan. Í okkara viðmerking verður hetta býtt sundur í tvey: gransking við orkuveiting til føroyskar samfelagið fyri eyga, ella føroyska gransking yvirhøvur.

Sum gransking við føroyskari orkuveiting fyri eyga, er vansin, at alduorka er óstøðug eins og vindorka, har vindorka tó hevur munandi fyrimun, tá tað kemur til kostnað.

Sum partur av gransking í Føroyum yvirhøvur, kann verkætlanin møguliga verða áhugaverd undir nøkrum fyritreytum.

Hetta var í høvuðsheitum tilmælið frá Jarðfeingi.

# Sparingar innan Heilsuverkið enn einaferð?

JÓNA MORTENSEN



Tað er mær ein gáta, at nakar tímir at arbeiða innan Heilsuverkið. Tað sum starvsfólkið upplivir har, má vera ótolandi.

Tað varð so nógv tosað um áðrenn valið, at øll tey sum vóru farin av landinum skuldu koma heim aftur á klettarnar. Til hvat? Til eitt land sum sparir eftir hæli? Eitt land sum sparir innan heilsuverkið og innan skúlaverkið, sparir eftir hæli. Tað kemur at vísa seg aftur í øllum samfelagnum. Tað fer at spreiða seg sum ringar í vatninum í øllum samfelagnum. Tað sigur seg sjálvt.

Fyri at trivnaðurin her á landi skal betrast, og fyri at nakar hugsingur skal verða um, at fólk tíma at flyta heim aftur á klettarnar, má hugburðurin broytast.

Vit minnast allar ræðusøgurnar í bløðunum herfyri, um tann eina sjúklingin fyri og annan eftir, sum høvdu upplivað ymiskt ótespiligt á Landsjúkrahúsinum. Tað er jú ræðuligt, at sovorið kemur fyri, men tað er undrunarvert, at ikki meira av slíkum hendir. Harragud tað eru bara mennisku sum arbeiða har. Niðurkoyrd mennisku, sum aðruhvørja løtu hava hóttanir um sparingar hangandi yvir høvdinum. Sum eru illa mannað, sum renna sum fluga í fløsku.

Hatta er ikki gongd leið púra vist.

Eg havi sitið á skaðastovuni fleiri ferð og bíðað og bíðað, ein heilan dag. Seinast við einum barni við ógvusligari pínu. Vit sótu har í sjey tímar, áðrenn ein lækni kom. Vit høvdu einki etið, tí vit roknaðu allatíðina við at koma framat hvørja løtu. Læknin sum tók ímóti okkum var sera fittur og blíðir. Eg segði, ja nú eru vit svangar, vit hava einki etið síðani í morgun. Tað havi eg heldur ikki, sigur læknin og smílir. Fólkið sum arbeiðir á Landsjúkrahúsinum eru sjálsama fitt og fyrikomandi, eg skilji ikki hvussu tey klára tað. Eg havi eisini fyri stuttum verið innløgd við tí sama barninum. Aftur má eg bara undrast yvir, hvussu fitt og fyrikomandi øll vóru.

Nei tað er ikki hjá starvsfólkunum ein skal leita eftir feilum. Men tað eru umstøðurnar sum heilt sikkurt ikki eru í ordan. Fyri at fáa nøgdar sjúklingar, mást tú fyrst og fremst hava nøgd fólk sum taka sær av sjúklingunum. Og tey mugu hava góðar rammur at arbeiða undir. Har er ikki rætta staðið at spara, tvørturímóti. Sparing eigur ikki at koma upp á tal á hesum økjum.

Tað sum harmar meg mest, er, at blokkurin bara blívir skorin meira og meira niður, ímeðan heilsuverkið og skúlaverkið skríggja eftir penguni. Tað kann ein kalla fyri ”dumstoltheit”.